# Uppgáva til næmingin

Barsakh - uppgávur




**Simon Stranger**

*Barsakh – Emilia, Samuel og Kanariuoyggjarnar.*

Juli Fagerland týddi úr norskum.
Bókadeild Føroya Lærarafelags 2014.

NÁM

## Áðrenn lisið verður

- Hvat veitst tú um flóttafólk?
- Hygg at heimskortinum og finn hesi støð: *Gana – Senegal - Kanariuoyggjar.*
- Hygg at ”Barsakh” ella ”flóttafólk” á YouTube.
- Hygg væl at myndini á permuni. Legg til merkis, at hetta er ein veggjamálningur, ið hevur sama heiti sum bókin. Hvussu heldur tú, málningurin kann ávirka fólk, ið hugsa um at flýggja?
- Les tekstin á bakpermuni.
- Les inngangin, sum Paul Mitchell hevur skrivað. Hví man henda frásøgnin standa fremst í bókini?

# Meðan tú lesur

Á síðu 11-12 í bókini er eitt brot, ið lýsir eina løtu, sum vit seinni hoyra um. Les hetta brotið og tekna eina mynd ella eina lítla teknirøð, ið lýsir tað sama sum teksturin.

### 1. Emilia
Skriva stutt, hvat tú heldur Emilia skrivaði í dagbókina hetta kvøldið.

### 2. Báturin
Hvat hugsar Emilia, tá hon sær bátin?

### 3. Samuel
Hvat hugsar Samuel um, tá hann sær land? Hvat var tað, sum gjørdi, at hann fekk hug at fara?

### 4. Farvæl
Hvat heldur tú, mamma Samuel hugsar, tá hann fer avstað?
Síðst í hesum parti sær út, sum Samuel ivast í, um hann skal fara. Finn okkurt dømi í tekstinum, sum kann siga okkum, hví hann ivast?

### 5. Høvdið undir vatni
Vit fáa at vita, hvat tey gera, men hvat munnu tey bæði hugsa aftaná?

### 6. Seinasti býurin áðrenn Sahara
Fortel Dánjalsa søgu. Tú kanst brúka myndirnar ella tekstin.

### 7. Emilia og Samuel
Tjúgu dagar á sjónum, heldur Samuel. Hvussu kann hann halda seg vita tað? Hvussu kennist tað, tá tey nema við hvørt annað?

### 8. Barcelona ella Barsakh
Hvønn leiklut hevur mannasmuglarin, og hvat fær hann burturúr?
Hvat liggur í hugtakinum”Barcelona ella Barsakh”?
Samuel fær eina týdningarmikla upplýsing frá listamanninum. Hvat man tað vera?
Í hesum parti er greitt frá, at Barsakh merkir: Staðið, har tú ert aftaná deyðan, meðan tú bíðar eftir dóminum. Hví heldur tú, at bókin hevur hetta heitið?

### 9. Flóttafólkini
Hvat kundi Emilia gjørt øðrvísi?

### 10. Ferðafólkalistin
Hví heldur tú, at júst hesi fólkini eru farin?
Hví vóru fleiri, ið ikki fóru, t.d. sum listamaðurin?

### 11. Havið
Finn dømi í tekstinum um, hvussu hugsanirnar hjá fólkunum umborð broytast á ferðini. Á síðu 56 – 57 verður siglitúrurin lýstur sum ein vakur túrur. Samanber hetta við síðu 61 og síðu 65.

Finn dømi í tekstinum um, hvar huglagið vendir.
Á hvønn hátt er Esowa øðrvísi enn hini í bátinum? Á síðu 116 síggja vit, at okkurt er broytt við honum. Hvussu er hann broyttur og hví?

### 12. Tey tómu húsini
Finn eitt brot úr hesum parti, sum vísir, at tey eru illa fyri. Finn eina aðra hóskandi yvirskrift til henda part.

### 13. Matur, nátt
Hvat hevði hent, um Emilia hevði ringt eftir løgregluni?

### 14. Aftur til húsini
Á hvønn hátt er Emilia broytt, síðani hon møtti flóttafólkunum?
Á síðu 14 sigur ein drongur í skúlanum soleiðis við Emiliu: ”Hevur tú ikki fingið ivaleyst av sovorðnum,” segði hann speiskliga og blásti luft í kjálkarnar. Fyri Emiliu var tað sum at vakna. Hesi einføldu orðini broyttu hana ...
Seinni í bókini sigur Samuel: ”Men tú ert jú so kløn?” helt hann fram og peikaði á skøvningarnar á henni. Tann beinuti liðurin og tær sjónligu spengurnar á tí klæna undirarminum. ”Er tað ein sjúka?” ( á síðu 90-91).
Greið frá, hvørja ávirkan tað hevur á Emiliu, sum hesir báðir siga. Hvat heldur tú um atferð Esowa? Hví ber hann seg soleiðis at?

### 15. Eitt vindeyga móti minnunum
Hvussu hevur Samuel tað nú?

### 16. Aftur til hotellið
Hvi ynskir Samuel, at hann ikki var farin heimanífrá?

## 2. partur
Síða 101-103.
Vel tær ein leiklut. Tú ert á staðnum, tú ert eitt djór ella eitt menniskja. Fortel hvør tú ert, hvat tú sært og hvat tú hugsar.

## 3. partur

### 17. Burtur
Mitt á síðu 108 stendur: ... Vanliga vildi hon havt verið errin av svongdini. Errin av, at hon hevði tamarhald ... Nú var errinskapurin burtur.
Hvat heldur tú, hon meinar við? Hvat er broytt?
Pápin spyr: ”Hvussu eitur hann?” Hví spyr hann soleiðis, hvat hugsar hann um? (á síðu 109)

”In Rome, do as the Romans” (síða 110). Hvat liggur í hesum orðafelli? Er hetta nakað, ið tú hevur hoyrt fyrr í samband við flóttafólk ella innflytarar?

**18. Býurin fyri fólk, sum ikki finnast**
Lýs henda partin í einum setningi.
Hvat liggur í hesum: Fólk, sum ikki finnast?

Greið frá, hví staðið, har tey fjala seg, verður kallað Barsakh.

**19. Seinasti døgurðin**
Hvat væntar tú fer at henda við Djenebu og Ousmane í framtíðini?

**20. Bíðitíðin**
Greið frá, hvat hendir ímillum Emiliu og Samuel í 20. parti. Síðst í hesum parti følir Emilia ein lætta. Hví?

**21. Fongslið**
Kundi Emilia havt fortalt okkurt annað, enn hon gjørdi? Hvønn leiklut hevur Sebastian í hesum parti?
Hví sigur Emilia, at hon bert kennir navnið Kofi?

**22. Emilia, Samuel og Kanariuoyggjarnar**
Hvussu hevur Samuel tað nú?
Heldur tú, at lepin, ið Emilia gevur Samuel, fer at hava nakran týdning? Hvat skrivar Emilia í dagbókina hetta kvøldið?

**23. Eftirmæli**
Á hvønn hátt er Emilia broytt?
Verður nakað øðrvísi, tá hon er heima aftur ?

## Tá ið vit hava lisið

- Lýs Emiliu og Samuel.
- Lýs foreldur Emiliu, hvørji eru tey og hvussu eru tey? Vit hoyra ikki so nógv um, hvussu tey reagera, tá tey fáa at vita, hvat Emilia hevur gjørt. Men hvussu roknar tú við, at tey reagera?
- Lýs lívið í Noregi og Ghana. Tú kanst gera tveir teigar við lýsingarorðum. Onnur lýsir lívið í Noregi, hin lívið í Ghana. Tit kunnu eisini finna ymiskar myndir ella filmsbrot, ið vísa munin. Eisini ber til at gera eina grafiska mynd, har tit t.d. tekna, hvat er felags og hvat er ikki. Ella tit skriva hvør sín setning og seta allar saman.

Høvuðsevnið í bókini er flóttafólk. Fleiri undirevni eru, t.d. mótsetningar, ríkidømi – fátækdómur, hjálpsemi – hjálparloysi, vón – vónloysi, etingarólag, kærleiki, longsul, ábyrgd.

- Finn dømi í søguni um, at Samuel og Emilia eru góð við hvørt annað.
- Finn dømi í søguni um, at Samuel leingist heim.
- Bátstúrurin skifti ímillum eina lítla vón og vónloysi. Finn dømi í tekstinum.
- Vel eina mynd í bókini og skriva nakrar hugsanir um tað, ið tú sært.
- Er okkurt í bókini, sum tú undrast á? Hvat?
- Er okkurt í bókini, sum minnir teg um okkurt, ið tú fyrr hevur lisið? Hvat?
- Hvat hevði tú spurt Emiliu, um tú møtti henni?
- Hvat hevði tú spurt Samuel, um tú fekst møguleikan?

Skriva stutt, hvussu tær dámar bókina. Tú kanst eisini gita, hvat fer at henda teimum báðum Emiliu og Samuel. Hittast tey aftur? Fer Samuel heim aftur til Ghana?

Tú fært meira at vita um Samuel, um tú lesur framhaldið av hesi bókini, *Tey, sum ikki eru til*.